tíðindablaðið
sosialurin

Telefon 1 18 20
Argjavegur 26, 3800 Argir
Postsmoga 76, 3800 Tórshavn

Útgávudagar: týsdag, hósdag og leygardag

Lýsingar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi kl. 10 dagin fyri útgávudagin

Útgevari:
P/f Sosialurin
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller
Fyritaksstjóri:
Krisjan Dahl
Blaðfólk:
Høgni Djurhuus
Randi Jacobsen
Dagny Joensen
Uppseting:
P/f Sosialurin
Prent:
P/f Pressan 1981

Pauli Ellefsen og Leirvíkarbergholið

Tá bergholið millum Gøtu og Leirvík var tikið í nýtslu, hevði Pauli Ellefsen grein í Dimmalætting.

Væntast kundi, at fyrrverandi løgmaður gleddist yvir lokið verk, sum **hansara** samgonga hevði avrikað, men so var ikki.

Sambandsflokkurin átti heiðurin, og hinir flokkarnir í samgonguni fingu háð og spott.

Hetta lýsir væl tann lítla mannin, sum ikki megnaði at gerast løgmaður í orðsins týdningi.

Tað er skeivt at bera út tað, ið fer fram innan samgongu undir viðgerð av máli, og tá Pauli Ellefsen ger tað, er tað skammiligt, tí tað minnir mest um sagnir: onkur sannur táttur, men meginpartur in er villleiðandi og ósannur. Frágreiðingin hjá Paula Ellefsen um gongdina innan samgonguna í hesum máli er ósonn.

Í somu grein rekur Pauli Ellefsen spott við størstu skarnsgerð móti Føroyum sum borgarligt, liberalt samfelag. Hann átti sjálvur høvuðsleiklutin.

Pauli Ellefsen átti heldur at stúrt fyri tí dómi, søgumenn fara at geva hesum sniðálopi á liberalt samfelag, serstakliga tá hugsað verður um, at løgmaður umboðaði borgarligan flokk.

Løgmaður rekur okkum fyri at vera lættir at syfta.

Tá fleiri flokkar eru í samgongu, er neyðugt at laga seg hvør eftir øðrum í stóran mun. Størsta brek hjá undanfarnu samgongu var, at hon hevði onga leiðslu, sum hevði evni at samskipa, tað ráddi meira um hjá løgmanni, sum í hesum máli, at brigsla.

Tað kom tó fyri, at Sambandsflokkurin var syftur.

Størsti varði eftir seinastu samgongu, samtíðarskatturin varð endaliga samtyktur í landsstýrinum, hóast sambandsumboðini í landsstýrinum ikki vildu vera við.

Hilmar Kass.

Burturblivni maðurin — reklamudukkan í Dagblaðnum

HERFYRI var upptøkuroynd til Blaðmannaskúlan í Árhus hildin í Føroyum. Hetta tiltak — tað fyrsta av sínum slag — varð fyriskipað av Landsskúlafyrisitingini og Blaðmannaskúlanum í Árhus. Tað var annars Føroya Blaðmannafelag, sum tók stig til at fáa hesa royndina til Føroya.

TAÐ er at fegnast um hetta tiltakið. Og enn meira um, at royndin komandi verður skipað á slíkan hátt, at hon meira samsvarar føroysk viðurskifti. Hesa ferðina var hon við donskum innihaldi. At føroyingar á henda hátt kunnu fara til upptøkuroynd til Blaðmannaskúlan í Árhus uttan at skula fara av landinum og haraftrat kunnu viðgera heimlig evni er eitt stórt framstig fyri tey, sum leita ta journalistisku leiðina og eisini fyri føroysku fjølmiðlarnar, sum í framtíðini hava brúk fyri útbúnum fólki.

Í SAMBAND við hesa fyrstu upptøkuroyndina var rektarin á skúlanum í Árhus í Føroyum. M.a. hevði hann samrøður við nevndina í Blaðmannafelagnum. Har kom m.a. fram, at tørvur er eisini á at skipa fyri eftirútbúgvingarskeiðum fyri føroyskar journalistar. Hetta tykist at vera eitt mál, sum Blaðmannafelagið leggur stóran dent á og vóna vit, at okkurt spyrst burtur úr — soleiðis at yngri og eldri journalistar her á landi longu til heystar kunnu sessast við skúlaborðið til at lurta og til at kjakast.

AT hetta er neyðugt fingu vit eina ávísa ábending um nú um dagarnar. Greinin »Maður burturblivin«, sum stóð á forsíðuni í Dagblaðnum 5. juli undirskrivað ójr., er ein stór vanvirðing av journalistiska yrkinum og handverkinum og ein háðan av nøkrum so heilagum sum sjálvum mannalívinum — og av lesarunum.

HENDA greinin snúði seg um, at ein maður var saknaður eftir karneval í Havn og at bert beinini av manninum vóru afturfunnin. Restin er ikki funnið. Seinni verður skrivað, at maðurin talan er um, er ein reklamudukka hjá Super Dekk Service.

TAÐ er ikki ætlan og ikki uppgáva okkara at vera nakar moralskur peikifingur. Harafturímóti er tað ábyrgd okkara, sum arbeiða við tí skrivaða orðinum — at vit ikki misbrúka skrivifrælsið. Júst tað vilja vit gera vart við her.

AT ein sorgarsøga um ein mann, sum er burturblivin, verður sett á eina forsíðu fyri at selja blaðið, er so eitt, sum hvørt einstakt blað ger av. Tað veldst um, hvørja linju ein leggur.

MEN so at fara at brúka slík tíðindi til skemt og samstundis reklamu fyri eina fyritøku er so burturvið, at tað átti at fingið fólk, ið vanliga lesa hetta blað, at rakna við og mótmæla. Tann, ið skrivar hesa greinina, er tann sami, sum altíð stendur á vakt, tá tað snýr seg um at verja kristindóm, frælsi og mannakærleika.

ALT tað vit vita, hevur tað verið siður í Føroyum at virða mannalívið so mikið høgt, at tú ger ikki gjøldur burtur úr tí á ein so ódámligan hátt, sum henda greinin er eitt fullgott prógv um.

OG aftaná at hava lisið hesa greinina kann lesarin so sjálvur gera sínar metingar um ta skriving og ta hetz ímóti annarleiðishugsandi menniskjum, sum hevur eyðkent Dagblaðið, síðani Óli Breckmann tók við sum blaðstjóri og Óla Jákup Rólantson gjørdist blaðmaður á hesum blaðnum.

ÁHEITAN okkara til Føroya Blaðmannafelag er at skunda undir ætlanina at skipa fyri eftirútbúgvingarskeiðum fyri journalistar. Slík skeið kunnu ikki bert teir á DB fáa gagn av, men allir teir blaðmenn, sum virða og ynskja at verja okkara skrivifrælsi.

jamú


DAGBLAÐIÐ

NR. 50 · 51. ÁRG. FRIGGJADAGUR 5. JULI 1985 5 KRÓNUR

Føroya Banki stóðugt meir inn í alivinnuna

Bondi í Sandovinni:

Biddara-gongd at selja neytakjøt

Maður burtur-blivin

Seinastu tað sokallaða karnevalið var í Gunda dalsbøllini herfyri, er ein maður, ið luttók í karnevalinum, saknaður. Leitað hevur verið dugliga seinastu dagarnar, og ígjár hattast leys oblignaliðini tilhondi, at heimin av mannin-um vera afturfunnin, meðan restin fram-vegis ikki er funnið. Leys avsavandi biðja nú almennugin um hjálp, tí lógreglan stendur

Ungdómsár

Hvat spurdist burtur úr tí fyrsta hálva árinum?

Tað einasta, sum eg veit, er at pengastovnarnir hava sett nakað í verk, sum teir kalla LØNARKREDITTUR, nú kunnu tit ungu fáa løn upp á kreditt. Løn hevur annars verið nakað við kontantum, men nú er tað ein kreditt, altso eitt minus tal.

Hesir menninir við tí kalda »yvirblikkinum« sita og rokna út, hvussu teir kunnu fáa fatur á hvørjari krónu, ið tit ungu tjena, ovurstórar rentur bliva kravdar fyri hesar kredittir, ert tú fyrst freistaður av hesum við tí kalda »yvirblikkinum« verður verri at koma upp at standa aftur. Tað er so, at eitt blikk hevur ógvuliga hvassar kantar. Skert tú teg, bløðir tað illa, so mikið nógv, at tú fært illa staðið uppi, og blivur tú liggjandi, koma síðani teir køldu paragraffarnir og tá verður hvaðna verri.

Nei, tit menn við tykkara køldu skallum, um ikki alt er fryst fast, so gerið heldur nakað fyri tey ungu tað hálva árið, ið eftir er.

Hvat við einum ungdómshúsi? Pengarnar hava tit í yvirflóð. Tað hevði eisini verið gott fyri samfelagið, um tykkara kaldi og køvandi moralur bleiv arkiveraður í nøkur ár og hádani frá koyrdur á tað umtalaðu ruskbrennistøðina, tá hon einaferð verður veruleiki, tá hevði verið báleldur.

rusk um snusk

Framhald av síðu 2

av meningococcum, ið elvir okkum hesar stóru trupulleikar í Føroyum. Sagt skal tó vera frá, at í løtuni verður starvast dúgliga, serliga í Hollandi og Norei, við at framleiða nýtiligt koppingarevni. Hetta arbeiði hevur verið trupult, og fer tí longri tíð at ganga, enn tað, ið roknað var við fyri hálvum ári síðan, til koppingarevnið verður tøkt. Men semja er framvegis um, at Føroyar vegna serliga ringu støðuna her við meningococsjúkuni verður eitt hitt fyrsta landið, har hópkopping skal fremjast, tá koppingarevnið er fingið til vega.

Høgni Debes Joensen, landslækni

Prógv

Terje Thomsen úr Kollafirði hevur á Handverkaraskúlanum í Sønderborg tikið prógv sum el-installatørur.



